Setan av Sundalagsstevnu 2002:

# – Sundalagið sum heild stendur í blóma



**Vit prenta røðuna, sum Jákup Pauli Joensen helt, tá hann setti Sundalagsstevnuna í Hósvík leygardagin**

Góðu Hósvíkingar! Góðu stevnugestir!

Nú føroyska summarið stendur í besta blóma, fylkjast ung sum eldri á summarstevnum. Stevnumentanin er eitt gamalt føroyskt fyribrigdi. Ferðingin ímillum bygdir á sumri hevur ivaleyst verið tyngri fyrr, enn hon er í dag, men altíð hevur hendan ferðing verðið tengd at gleði og gaman. Sum við øllum stórum stevnum, er tað ikki minst ungdómurin sum fær høvi at hittist í ítrótti, spæli, sangi og dansi.

Nógv samband hevur altíð verið ímillum grannabygdirnar her í Sundalagnum. Tað vóru bygdirnar Hósvík, Kollafjørður og Hvalvík/Streymnes, sum saman settu sær fyri at fáa ílag eina stevnu, sum kundi teljast ímillum stóru summarstevnurnar í landinum.

Hóast bygdirnar framvið Sundalagnum eru smáar, so eru tær á leikvøllum stinnar og áhaldandi. Kappróður hevur verið tann ítróttargreinin, sum hevur havt sterkast festi ímillum fólk í Sundalagnum. Hvør bygd hevur sítt kappróðrafelag, og tað er ein sonn gleði, tá tey ungu ímóti sumri taka bátin út, og gleðin er ikki minni, tá róð verður á stevnum. Nógvur spenningur er um úrslitið, men størsta gleðin og størsti áhugin eru tengd at luttøkuni hjá bátinum, sum umboðar bygdina. Eisini í dag koma bátarnir at dystast og okkara ungdómar fáa høvi at hittast á leikvølli, í spæli og í dansi.

Okkara sangmentan hevur djúpar røtur í tí føroyska samleikanum. Okkara søga er fyri ein stóran part søgd í kvæðum, yrkingum og táttum. Hósvík er ein bygd við einum sera ríkum mentanararvi. Júst á hesum øki, her vit standa í dag, eiga tveir av okkara mest fólkakæru yrkjarum mong sporini: Áarstovubrøðurnir Janus og Hans Andrias Djurhuus høvdu røtur higani úr Toftum í Hósvík. Mamman, Giljanna, var bóndadóttur higani, og hendan yrkjaramentan er framvegis livandi, bæði her í Hósvík, í Kollafirði og aðrastaðni við.

Í einum av søgunum hjá Hans A. Djurhuus letur hann tindarnar tosa. Vit hoyra Árnadalstind og Slættaratind togast um, hvør teirra hevur besta útsýni. Eftir at hesir hava togast eina løtu, kemur Skælingsfjall uppí og vísir á sínar dygdir. Men vakrir og stórbærir eru teir, hvør á sín hátt. Soleiðis er eisini við bygdunum framvið Sundalagnum.

Tað verður ofta sagt um bygdir og býlingar, sum liggja nærhendis einum størri býi at tær eru sovibygdir. Men bygdirnar í Sundalagnum eru als ikki sovibygdir. Her hendir nógv um dagarnar og langt út á næturnar. Mentanin stendur í fagrasta blóma. Her eru eitt nú ítróttarfeløg, bygdafeløg, kór, meinigheitsfeløg og bindiklubbar. Burtur úr hesi virknu mentan er á nógvum økjum sprottið eitt grannasamstarv, har felagsskapurin kann mennast. Felagskommunala nevndin í Sundalagnum kann m.a. takast sum dømi um eitt gott samstarv ímillum javnstillaðar bygdir. Tað er altíð neyðugt at taka støðið í teimum fortreytum sum eru og alt samstarv eigur tí eisini at byggja á tann samleika, sum fólkið í hvørji einstakari bygd hevur.

Sundalagið sum heild stendur í blóma. Vinnuvirksemið veksur. I tíðarskeiðum við stórari menning er altíð neyðugt at verða ansin, soleiðis at tey virðir, sum eru, og sum kanska ikki altíð verða roknaði fyri so nógv, ikki fara fyri skjeyti. Eg hugsi her, um tað vøkru og ríku fjøruna, sum vit, sum børn og gomul, hava so stóra gleði av.

Tann megin, sum liggur í tí heimliga og í nærumhvørvinum, kemur til sjóndar á tílíkum stevnum sum hesari. Tit eru nógv, sum hava lagt stóra orku í at fyrireika hesa stevnu og tey tiltøk, sum her eru. Tað eru tit, sum gera tað møguligt at hava hesar stóru summarstevnurnar og soleiðis røkja hendan týðandi part av føroysku mentanini. Tað eru tit, sum eiga ta stóru tøkkina. Eg fari eisini at nýta høvi til at takka fyri tað álit, mær er víst, at fáa í boði at seta Sundalagsstevnuna.

Eg skal enda við at lesa eina av yrkingunum hjá Hans Andriasi Djurhuus: Vármynd, skriva í 1935.

*Mánin lýsir í túni,*
*skyggir í káman glugga,*
*ljóst stendur stovubróstið,*
*fjósið er alt í skugga.*

*Heygurin glitrar í gulli*
*oman at mýribakka.*
*Sóleygan veittrar í veitum*
*við gulum knýti á nakka.*

*Fjøllini handan fjørðin*
*hyljast burtur í bláum.*
*Oman úr brekkuni ljóðar*
*dunið av stórum áum.*

*Aldan fløðir um rivið,*
*bloytir, kembir og havnar,*
*lotið í neystadurum*
*tekur um svartar stavnar.*

*Lýkka og fleyr av suðri*
*ferðast um stillar strendur.*
*Vártám sum bláur roykur*
*rekur um fjallarendur*

Við hesum orðum fari eg at lýsa Sundalagsstevnuna ár 2002 at verða setta.

Takk fyri!

## Kunnu gerast professións-bachelorar innan bygningskonstruktión

BYGGIFRØÐI

*Tíðindaskriv*

Sum nakað spildurnýtt stendur nú føroyingum í boði at fáa sær útbúgving sum professiónsbachelorar innan bygningskonstruktión.

Talan er um byggifrøðingaútbúgvingina, ið sum tann fyrsta av sínum slag í Danmark er góðkend sum ein sonevnd professións-bachelor-útbúgving. Byggifrøðingaútbúgvingin er ein hægri teknisk útbúgving innan projektering og bygging. Útbúgvingin er væl kend og nógv eftirspurd í Danmark.

- Tað hevur stóran týdning fyri byggifrøðingar, sum vilja royna sínar kreftir úti í heimi, at útbúgvingin nú er góðkend sum ein bachelor-útbúgving. Uttanlands er byggifrøðingaútbúgvingin ikki alla staðni so væl kend, men nýggja góðkenningin og nýggja, altjóða heitið skal hjálpa til í so máta, sigur Johan Eli Ellendersen, projekt-leiðari á Vitus Bering Center for Videregående Uddannelse.

Enska heitið á útbúgvingini er: Bachelor of Architectural Technology and Construction Management.

Fleiri ferðir er byggifrøðingaútbúgvingin tillagað eftirspurninginum á arbeiðsmarknaðinum. Seinasta stóra broytingin kom í fjør, tá útbúgvingin gjørdist ein samanhangandi 3 1/2 ára long útbúgving við einum trimum mánaðum longum praktikkupphaldi í einari fyritøku í tí næstseinasta hálvárinum av útbúgvingini.

Vitus Bering Center for Videregående Uddannelse í Horsens er størsti skúlin í Danmark við byggi- og verkfrøðingaútbúgvingum, og hann býður nú føroyingum at gerast professiónsbachelorar innan bygningskonstruktión.

Hóskvøldið 25. juni 2002 kl. 19.00 skipar skúlin fyri einum kunnandi fundi á Hotel Hafnia í Havn. Har ber til at frætta um nýggju professiónsbachelor-útbúgvingina og hinar útbúgvingarnar, sum skúlin í Horsens hevur at bjóða. Projektleiðarin og føroyingurin, Johan Eli Ellendersen, frá Vitus Bering stendur fyri kunnandi fundinum, har øll áhugað eru vælkomin, sigur Johan Eli Elendersen, project manegar í Vitus Bering International. Hann hittist á telefon +45 7625 5054/Mobile: +45 2338 2655 ella á e-mail: jee@vitusbering.dk



# Føroyar við í filmi um orkumál og sjálvstýri

**Norska sjónvarpsrásin TV2 hevur latið filmsfyritøkuni Pandurafilm uppgávuna at gera eina sjónvarpsrøð um oljuspurningar í heimshøpi og í hesum sambandi verður eisini settur ljóskastari á føroyska samfelagið sum dømi um eitt samfelag, har oljan júst er við sína byrjan**

*Jan Müller*



*Turid Rogne og myndamaður hennara vitja á Sosialinum í ssambandi við eina sjónvarpsrøð um orkutilfeingi og sjálvstýri.*
*Mynd Eirikur Lindenskov*

Í farnu viku var eitt norskt filmslið í Føroyum. Tað er Pandurafilm, eitt óheft filmsfelag, sum hevur fingið uppgávu frá norsku sjónvarpsrásini TV2 at gera ein dokumentar film í trimum pørtum uppá 50 minuttir hvør um orkutilfeingi og orkumál í heimshøpi, og í hesum samhangi verður eisini sett fokus á Føroyar.

Turid Rogne er journalistur og hevur saman við filmupptøkumanni verið í nógvum ymsum londum og gjørt upptøkur og samrøður. Ætlanin er at vísa røðina í TV2 í 2003, umframt at røðin verður víst í sjónvarpi í nógvum ymsum londum.

Endamálið við hesi sjónvarpsrøð skrivar blaðið víðari er at fáa eitt altjóða yvirlit yvir nýtslu, tørv og stríðið fyri orkutilfeingi og avleiðingannar av hesum við grundarlag í søgum og myndum ymsa staðni frá í heiminum.

Turid Rogne sigur, at ætlan teirra er at gera Føroyar til ein part av hesum søgum. Føroyar eru sera áhugaverdar fyri hesa røðina orsakað av, at enn er oljuvinna bert í síni byrjan. – Vit fara at hyggja nærri at, hvørjar vónir eru knýttar at oljuni og hvussuleiðis oljuvinnan kann koma at ávirka føroyska samfelagið. Her er spurningurin um føroyskt sjálvstýri ein týðandi partur, soleiðis sum vit síggja tað, og vit halda, at Føroyar kunnu virka sum eitt dømi um, hvønn leiklut atgongd til oljutilfeingi kann hava í »nasjons- og identitetsbygging« sum hon málber seg.

Tað er í hesum sambandi, at norski journalisturin hevur vitjað í Føroyum í eina viku og hevur tosað við politikarar, vinnulívsfólk og fjølmiðlafólk. Sosialurin skilur, at stórur dentur verður eisini lagdur á týdningin møguligar komandi oljuinntøkur kunnu fáa fyri royndirnar hjá føroyingum at gerast meira sjálvstøðugir. Millum fólkini tosað hevur verið við eru Høgni Hoydal, Jóannes Eidesgaard, Anfinn Kallsberg, Ben Arabo og mong onnur.

Turid Rogne sigur við Sosialin, at tey hava fingið sera væl burtur úr í Føroyum og er hon ikki minst fegin um veðrið, sum vísti seg frá øllum síðum við sól, regni og stormi. Av tí at røðin ikki fer av bakkastokki fyrr enn í mars næsta ár er ikki møguligt at gera føroyska partin lidnan fyrr enn í evstu løtu. Turid Rogne sigur, at verða boringarnar hjá Hess í juli væleydnaðar ella tað gongur hinvegin, so vil tað sjálvandi eisini hava ávirkan á føroyska partin. Undir øllum umstøðum verða Føroyar sum eitt jomfrúuligt oljuøki av stórum týdningi fyri filmin skilst.

# Bretsk skattahækking týdning fyri Føroyaøkið

**Ein møguligur eykaskattur á oljufeløg í Bretlandi kann fáa positivar avleiðingar fyri oljuleiting við Føroyar**

OLJA

*Jan Müller*

Um álvari verður gjørdur burtur úr ætlanini at leggja eykaskatt á oljufeløgini, sum virka í bretskum øki, verður tað bráddliga meira attraktivt fyri feløgini at gera íløgur í oljuleiting aðrastaðni í heiminum, og hetta kann so eisini blíva áhugavert fyri Føroyaøkið. Sosialurin skilur, at ein avleiðing av hesum kann blíva, at oljufeløgini fara at vísa størri áhuga fyri leiting við Føroyar. Sama vil so eisini verða galdandi fyri norska, danska og hálendska landgrunnin.

Taka vit føroyska partafelagsskattin fyri oljufeløg er hann 27%. Verandi partafelagsskattur í Bretlandi er 30%, so við nýggju hækkingini, sum stjórnin skjýtur upp, kemur hann uppá heili 40% tvs. 13% hægri enn tann føroyski. Føroyaøkið blívur harvið meira kappingarført og attraktivt tá tað um henda skattin umræður.

Hetta kann koma væl við hjá eitt nú italska oljufelagnum, Agip, sum skal til at bora sín fyrsta brunn í føroyskum øki næsta ár. Eftir tveir turrar brunnar á landgrunninum í fjør er tørvur eisini á at fáa onkran nýggjan ljósglotta. Ein heppin boring hjá Hess í bretskum øki nær føroyska markinum í næsta mánað kann fáa avgerandi týdning fyri komandi áhugan fyri føroyska økinum. Og kemur nú ein stór skattahækking á oljufeløg í bretskum øki, kann tað økja áhugan fyri føroyska landgrunninum, og harvið eisini fyri boringini hjá Agip næsta ár.

Tað hevur felagið helst eisini brúk fyri, tí sum er stendur tað nærum einsamalt við øllum váðanum, tá tað fer undir eina boring, sum kann koma at kosta einar 200 mill. kr. Agip stendur fyri 93% av lisensinum, Føroya Kolvetni fyri 7% men við møguleika fyri at hækka tað uppí umleið 20%. Millum oljufólk verður tó mett, at tað hevur stóran týdning fyri eitt felag sum Agip, hóast tað er stórt, at tað fær okkurt annað stórt oljufeløg sum partnara og sum harvið kann taka ein part av váðanum. Tað er heilt óvanligt, at eitt felag stendur fyri nærum øllum váðanum, tá borað verður í einum heilt nýggjum øki og haraftrat úti á djúpum vatni. So hvør veit: skattahækkingin í Bretlandi kann hava positivar avleiðingar fyri oljuleitingina her hjá okkum, bæði uppá stytri og longri sikt sikt siga keldur í oljuvinnuni, sum blaðið hevur tosað við.

*Ein munandi hægri oljuskattur í bretskum øki enn galdandi er her hjá okkum kann hava positivar avleiðingar fyri áhugan fyri føroyska landgrunninum. Myndin er frá boringini hjá Hess í fjør.*
*Mynd Jan Müller*



## Bretar leggja 10% eykaskatt á oljufeløgini

OLJA

*Jan Muller*

Ætlanin hjá bretsku stjórnini at hækka partafelagsskattin fyri oljufeløg við 10% hevur skapt mikla øsing í Bretlandi, her ikki minst í Skotlandi, hvørs búskapur er sera nógv tengdur at oljuvinnuni. Tað var í apríl, at fíggjarmálaráðharrin Gordon Brown legði nýggja fíggjarætlan fram og í henni hevur hann so eisini innroknað eina skattahækking uppá 10% av yvirskotinum hjá oljufeløgunum, sum arbeiða í bretskum øki. Hetta hevur fingið bæði oljufeløg, myndugleikar og vinnuna at tala harðliga at. Stjórin í BP John Browne hevur kallað uppskotið hjá navnanum Brown fyri tápuligt og hevur biðið stjórnina umhugsað tað av nýggjum, meðan tíð er. Enn ber til at taka uppskotið aftur, men sum er stendur tað við.

Felagið hjá 32 oljufeløgunum í Bretlandi UKOOA hevur roknað út, at meirskatturin fer at kosta oljufeløgunum 80 milliardir krónur í nýggjum skatti fram til ár 2010. Víst verður á, at avleiðingin av hesum kann gerast, at oljufeløgini fara at útseta ella heilt steðga við nýggjari oljuleiting í Norðsjónum í eini tíð, har tað annars hevur nógv at siga fyri Bretland, at tað verða funnar nýggjar oljugoymslur, nú Bretland um ikki so nógv ár verður innflytari av olju til sín egna heimamarknað. Eisini verður víst á, at tey 50.000 størvini í oljuvinnuni í Skotlandi eru í vanda. Tað hevur fingið politikarar og vinnulívsfólk í Skotlandi til at fara uppá barrikadurnar og mótmælta ætlanini.

Umboð fyri stjórnina siga harafturímóti, at oljufeløgini tola væl at gjalda hægri skatt, nú yvirskotið er so stórt. Oljufeløgini hinumegin siga, at hetta er ikki rætt og halda, at fíggjarmálaráðharrin er lopin framav og hevur skundað sær ov nógv.